# Texaco-bólkur er klárur til at skriva umsókn



*-Eftir at hava gjørt kanningar í meira enn fimm ár meta tey trý oljufeløgini, Texaco, Conoco og Murphey seg nú liðug við tøkniliga partin av arbeiðinum og harvið eisini nærum klár at skriva umsókn um leitiloyvi*



*Umboð fyri Texaco, Conoco og Murphey saman við umboðum fyri føroyskar oljumyndugleikar á Hotel Hafnia nú um dagarnar, har feløgini løgdu fram úrslitið av tí tøkniliga arbeiðinum á føroyaøkinum seinastu 5 árini. Mynd: Jan*

JAN MÜLLER

Texaco Faroes Group, sum fevnir um tey trý amerikonsku oljufeløgini, Texaco, Conoco og Murphey er so gott sum klár til 1. útbjóðingina á føroyskum øki. Umleið 10 fólk frá teimum trimum oljufeløgunum vóru í Føroyum herfyri fyri at kunna føroysku oljumyndugleikarnar um tað stóra og rættiliga umfevnandi kanningararbeiði tey hava gjørt av føroyska økinum.

-Vit løgdu fram úrslitið av tí tøkniliga arbeiðinum vit hava gjørt í nærum fimm ár. Tað eru skjótt tvey ár síðani, at vit góvu føroysku oljumyndugleikunum eina frágreiðing, og nakað er broytt síðani tá. Og tí hildu vit tað vera rætt nú at gera støðuna upp sigur Donald Driscoll, leitingarstjóri fyri Føroyaøkinum. Donald Driscoll hevur arbeitt hjá Texaco í mong ár, og nú felagið er operatørur í bólkinum, er tað eisini hann, sum stendur á odda fyri øllum arbeiðinum.

Tey trý oljufeløgini hava verið millum teir virknu bólkarnar á Føroyaøkinum, síðani loyvi varð givið til forkanningar. Eitt skifti var eisini oljufelagið Arco við í hópinum, men tók seg so úr, tá tað kom uppá tal, at BP skuldi keypa upp felagið.

Donald Driscoll sigur, at feløgini hava gjørt sítt tøkniliga arbeiði so mikið klárt, at tey nú kunnu fara undir at skriva umsókn til føroysku myndugleikarar um at fáa leitiloyvi.

Tey eru nøgd við úrslitið av tí tøkniliga arbeiðinum. Tað er „encouraging“ - „uppmuntrandi og lovandi“ - sum hann málber seg.

Tey 10 fólkini frá bólkinum vóru í Føroyum júst um sama mundið, sum 1. útbjóðingin á føroyskum øki varð almannakunngjørd fyri umheiminum, og sostatt vóru tey eisini tey feløgini, sum vóru fyrst til at fáa útbjóðingartilfarið.

Donald Driscoll er nøgdur við útbjóðingina, og hann heldur eisini, at røttu og kanska mest áhugaverdu økini eru við í 1. útbjóðing. Teigarnir eru í hvussu so er so mikið áhugaverdir, at Texaco-bólkurin helst fer at senda eina umsókn inn.

Sjálvandi vóna teir at kunna koma vi eini góðari umsókn til tess at kunna koma upp í part, tá loyvini og harvið eisini tey bestu økini skulu lutast út. Hann sigur, at neyvan verða øll nøgd við útbjóðingina, tí tað er avmarkað, hvussu mong øki eru sera áhugaverd. Men har er nokk til at fara undir eitt veruligt leitingararbeiði, og tað er tað mest umráðandi. Kanningar vilja so vísa, um øki, sum í dag ikki tykjast so lovandi, kunnu vera meira lovandi, tá man hevur kannað tey nærri.

*Umhvørvisparturin av eini føroyskari oljuvinnu hevur sera stóran týdning. Her hittir stjórin í Texaco-bólkinum Jákup Paula Joensen, sum arbeiðir við umhvørvismálum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Mynd: Jan*

Donald Driscoll er nøgdur við treytirnar fyri 1. útbjóðing. Bæði lisenstreytirnar og aðrar treytir eru innbjóðandi.

Tey trý feløgini í bólkinum eru sinnað at gera eitt gott arbeiðsprogramm og fáa tey eitt loyvi, so meta tey seg at hava hava bæði tøkniligu royndirnar og eisini pengarnar til tess at fara út í og gera eina leitingarfasu lidna og seinni fara víðari til framleiðslu.

Hvat viðvíkur boring í ár 2001 sigur Donald Driscoll, at tað besta hevði verið um tað ikki er liðið so nógv út á árið, til teir kunnu seta borin í. -Øll vita vit, hvussu veðrið kann vera í seinnu helvt av árinum. Tað er møguligt at bora til út í september 2001, men helst eigur boringin ikki at verða seinni enn í august.

Sosialurin skilur, at fær Texaco-bólkurin nakrar góðar teigar, so er hann eisini sinnaður at fara eftir nøkrum teigum, sum í dag verða mettir minni áhugaverdir.

Ein av treytunum fyri luttøku í oljuleiting er, at oljufeløg lata upp skrivstovur í Føroyum. Donald Driscoll sigur, at teir vóna at skriva undir sáttmála um eina skrivstovu í næstu framtíð.



*Ein av serfrøðingunum hjá Texaco-samtakinum greiðir føroyingum frá seinastu og nýggjastu úrslitunum frá Føroyaøkinum. Tey síggja lovandi út. Mynd: Jan*



# Oljuríkidømi og samfelagslig árin

*Í kvøld klokkan kl. 19.30 verður skipað fyri pallborðsfundi - eini hoyring - í útvarpshøllini undir heitinum „Oljuríkidømi og samfelagslig árin“. Tað er Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, sum skipar fyri tiltakinum, sum er alment*

JAN MÜLLER

Ikki kann sigast, at oljuvinnan hevur átt nógv pláss í tí almenna orðaskiftinum her heima hesi mongu seinastu árini stórar fyrireikingar hava verið gjørdar til oljuleiting á føroyska landgrunninum.

Hetta heldur eitt av politisku feløgunum í landinum, at nakað eigur at verða gjørt við. Tí skipar Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag fyri einum almennum fundi í útvarpshøllini í kvøld um hetta stóra málið.

Í einum kunningarskrivi til fjølmiðlarnar undan fundinum í kvøld verður víst á, at fyri tann vanliga føroyingin er oljuvinnan enn heldur fjald í framtíðarinnar mjørka, og torført er at meta um, hvørjar avleiðingar henda vinna hevur fyri samfelagið og tann einstaka. Vit vita, at nógvur peningur er í hesi vinnuni, og møguliga eru nógv arbeiðispláss eisini. Men vit vita onki um, hvussu eitt møguligt oljuríkidømi fer at broyta tað føroyska samfelagið.

Stóri spurningurin er, halda stigtakararnir til fundin, um vit eru til reiðar at møta hesi oljuvinnuni.

Oljufeløgini eru mannað av hørðum vinnulívsfólkum, ið vita, hvat tey vilja. Men vita vit, hvat vit vilja við oljuvinnuni? Er oljuvinnan bert eitt nýtt gullnám, ið nøkur ávís fáa loyvi at troyta? Ella kann eitt møguligt oljuríkidømi vera øllum samfelagnum at gagni verður spurt.

Tað er í eini roynd at seta orð á hesa framtíð, at Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag fyri eini hoyring um oljuríkidømi og samfelagslig árin. Ætlanin er at viðgera, hvørji ítøkilig árin oljuvinnan hevur á føroyska vinnulívið, og hvørji samfelagslig árin ið standast av hesi vinnu.

Fyrireikararnir halda, at lættast er helst at viðgera “vinnulívspartin”, tí har eru vit komin longst. Føroysk oljufeløg eru stovnað, fleiri útlendsk oljufeløg hava deildir í Føroyum og eitt nýtt aðalstýri er skipað, sum tekur sær av fyrisitingini av oljumálum. Hinvegin er líkt til, at tað helst eru ógvuliga fá, sum hava gjørt sær tankar um hvørjar samfelagsligar broytingar, ið fylgja við oljuvinnuni. Á hvønn hátt fer oljuvinnan at ávirka dagliga lívið hjá tí vanliga føroyinginum? Fær oljuvinnan ávirkan á bústaðarmynstrið í Føroyum? Koma lønarligir ójavnar í vinnulívið, ímillum tann partin ið tengdur er at oljuvinnuni, og tann partin ið ikki er? Hvussu kann oljuvinnan leggjast til rættis soleiðis, at negativu árinini mótvegis umhvørvinum gerast so fá sum møguligt? Og hvussu skulu samfelagsligu ágóðarnar av einum møguligum oljuríkidømi brúkast og umsitast?

Tiltakið er skipað sum ein *hoyring*, og tað er fyrsta ferð, at hetta verður roynt í Føroyum siga stigtakararnir og vísa á, at luttakararnir eru býttur upp í “serfrøðingar” av ymiskum slag og tveir spyrjarar, ið eru politikarar. Tá luttakararnir hava hildið síni upplegg, kunnu spyrjararnir seta teimum kritiskar spurningar, har borað verður í tí, ið sagt er. Somuleiðis kunnu spyrjararnir gera sínar egnu viðmerkingar. Afturat hesum kunnu fundarluttakararnir gera viðmerkingar og seta spurningar, eins og undir vanligum pallfundum. Vónað verður, at hetta elvir til eitt meira lívligt tjak enn vanligt er á pallfundum.

Luttakarar eru hesir:
Jan Müller, blaðstjóri Sosialurin, Herálvur Joensen, aðalstjóri Oljumálastýrið, Kjartan Hoydal, skrivstovuleiðari NORA, Jákup Pauli Joensen, Heilsufrøðisliga Starvsstovan og Óla Jákup úr Dímun, bóndi Stóra DímunSpyrjarar eru: Torbjørn Jacobsen, Tjóðveldisflokkurin og Hendrik Old, Javnaðarflokkurin Orðstýrari er Jógvan Arge, programleiðari í Útvarp Føroya




# Ferðaleiðarastarv gevur førleika

*Í farnu viku var altjóða ferðaleiðaradagur hildin kring allan heim, og í hesum sambandi var danin, Palle Højsholt, á vitjan her í Føroyum*

JÁKUP MØRK

Ørindi hansara á føroyaferðini vóru millum annað, at hann við hesum eisini fekk gjørt føroyingar varugar við teir útbúgvingarmøguleikar, sum innan ferðaleiðaraøkið.

Sjálvur hevur hann drúgvar royndir á økinum, við tað at hann í tíggju ár hevur starvast sum ferðaleiðari hjá teimum stóru donsku ferðafyriskiparunum.

Allir hesir hava vanliga havt sínar egna skúlar, har nýggir ferðaleiðarar verða uppaldir, men fyri at brót upp úr nýggjum, hevur Palle Højsholt, saman við øðrum, sett á stovn ein óheftan altjóða ferðaleiðaraskúla.

### Eisini fyri føroyingar

Skúlin hevur longu nú nøkur skúlaskeið á baki, og millum luttakararnar hava higartil verið níggju føroyingar.

Ein av hesum føroyingum er 23 ára gamla Rósmari Hellisdal, og sjálv er hon als ikki í iva um, at hon hevur fingið stóra gleði burtur úr sínum skúlaskeiðið.

Rósmari var á skúlanum allan mei mánað seinasta ár, og sjálv sigur hon, at hetta er størsta uppliving, sum hevur havt higartil.

Við tað at talan er um ein altjóða skúla, møtir ein nógvum fólkum frá øðrum londum, og ger hetta, at tú lærur nógv um verumátan hjá øðrum fólki.

Sjálv undirvísingin er skipað soleiðis, at allir næmingarnir í ein mánað eru á einum ferðastaði í Spaniu ella Malta, men kortini skal hetta ikki skiljast sum nøkur frítíðarferð.

Talan er um hart arbeiði so at siga alt samdøgrið, og sambært føroysku gentuni, so kundi hetta til tíðir vera rættuliga strævið. - T.d. er tað ikki altíð líka stuttligt at skula upp klokkan átta á morgni, tá tú hevur dansað alla náttina, men hetta má man so bara taka við, greiður Rósmari frá.

Sjálv hevur hon ikki sum so ætlanir um at starvast sum ferðaleiðari, men hon kundi væl hugsað sær at arbeitt við tilrættisleggjan av ferðum. Tískil gjørdi hon av at fara á skúlan, soleiðis at hon á tann hátt kundi læra eitt sindur um yrki.

### Ikki bara stuttligt

At ferðin er strævin, er so sanniliga eisini ætlanin, greiðir Palle frá.

Arbeiðið sum ferðaleiðari kann kanska tykjast sum eitt spæl fyri nógv. Ókeypist ferðir hvørt summar, og møguleikan at sleikja sól á suðurlendskum strondunum, ljóðar kanska lokkandi, men tað er nú ikki bara stuttligt.

Starvstíðin hjá einum ferðaleiðara er heldur ikki longur enn nøkur fá ár, og boðar hetta eisini frá, at talan er um eina strævna tilveru, men hinvegin vísur Palle á, at hetta í flestu førum eisini gevur ein vinnuførleika, sum kann koma ferðaleiðarunum til góðar í nógvum øðrum lutum.

- Við tað at skúlin er somikið strævin, duga vit eisini beinan vegin at síggja, um ein næmingur er egnaður til hetta lívið, greiðir Palle frá, samstundis sum hann vísur á, at stórur eftirspurningur er eftir næmingum teirra.

Skúlin virkar eisini sum ein formidlari av starvsplássum, soleiðis at ymsu ferðastovurnar venda sær til skúlan, sum síðani ger av, hvørjar næmingar tey halda egna seg til starvið. Starvsøkini eru sera víttfevnandi og eru fyrrverandi næmingar hjá skúlanum at síggja sum á m.a. skíferðum, gistingarhúsum, barrum, bussum og flúgvarum. Palle Højsholt tykist eisini at vera ikki sørt errin, tá hann greiðir frá, at higartil eru allir næmingarnir frá skúlanum slopnir fram at til samrøðu, so góðskan á undirvísingini skuldi verið í lagi.

### Meira tilfar

Um so er, at onkur av lesarunum skuldi havt áhuga fyri hesi útbúgvingini, ber til at frætta meira við at venda sær til Tora Tourist Traffic, sum umboðar skúlan her á landi.

Eisini ber til at leita um alnetið á www.service.dk.

Á heimasíðuni hjá skúlanum eru fyrrverandi næmingar eisini skrásettir við telefonnummari, soleiðis at tað er gjørligt at seta seg í samband við hesi, fyri at fáa meira at vita um útbúgvingina.



*Palle Højsholt og Rósmari Hellisdal*